# Við kristnum sjónvarpi



*Arbeiðið á Visjon Norge er sera fjølbroytt og Hanus skal duga eitt sindur av hvørjum*

**Síðani í summar hevur Hanus Jacobsen úr Saltangará arbeitt hjá kristnu norsku sjónvarpsstøðini Visjon Norge.**
**- Okkara mál er ikki bert at hava eina sjónvarpsrás koyrandi, men at menniskju skulu verða frelst, sigur hann í samrøðu við Sosialin.**

SJÓNVARP
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Noreg:** - Henda sjónvarpsstøðin er ein ótrúligur máti at koma heim í stovurnar hjá fólki, sigur Hanus.

Visjon Norge er fyrsta kristna sjónvarpsstøðin sum sendir 24 tímar um samdøgrið. Og í dag kunnu fólk í 38 europeiskum londum síggja sendingarnar.

Tað er lítil ivi um, at nógv fólk hyggja eftir sendingunum hjá Visjon Norge. Tað fáa tey prógv fyri nærum hvønn einasta dag.

- Bara í fjør vórðu 500 fólk frelst, eftir at tey høvdu sæð eina av okkara sendingum. Eftir sendingina kundu tey ringja inn, og her vóru fólk hjá okkum til reiðar at biðja fyri teimum.

- Og so vita vit bert um tey sum hava ringt inn. Vit kenna ikki øll tey mongu, sum ikki ringdu inn. Ja, spyrt tú meg, so kalli eg tað fyri úrslit, sigur 18 ára gamli Hanus.

**Altíð uppá vakt**
Síðani á sumri í fjør hevur hann arbeitt fyri hesa kristnu rásina. Og á nýggjárinum fekk hann í roynd og veru fast starv her.

- Vit høvdu aldrin droymt um at ein sjónvarpsrás kundi verða til so stóra gleði hjá fólki. Tað er í roynd og veru hetta sum heldur flammuni og viljan brennandi hjá okkum.

Nøkur av teimum vóru í ferð við at taka lívið av sær, tá tey vórðu frelst av at síggja onkra sending hjá Visjon Norge. So, - nógv fólk eru á lívi í dag, bara av tí at 30 fólk í Noregi lata seg brúka av Harranum.

Tað er helst so sum Hanus sjálvur sigur:

- Tað er umráðandi at ein altíð er uppá vakt, og altíð er klárur at fylgja Gudi, hvar enn so leiðin ber! Tað kann verða hart og keðiligt í tíðum, men vit standa altíð sum vinnarar í síðsta enda!

**Ljóð og ljós**
Hanus hevur sjálvur gingið í samkomuni Kelduni í Skálafirði alt sítt lív. Tað hevur ikki bara hann gjørt, men so at siga øll familjan eisini.

Í Kelduni er eitt virkið samkomulív, og teir einstøku limirnir átaka sær fegnir ymiskar uppgávur.

- Eg plagdi at miksa ljóð og var eisini ljósmaður. Og eg var haraftrat við í framleiðsluni av talufløgum.

- Ja, eg hjálpti eisini av og á til í byggingini av samkomuni, men tað var fyri so vítt ikki nøkur uppgáva, greiðir Hanus frá.

> *Um vit hava sett eina sending á skránna klokkan 20, ja, so má hon byrja klokkan 20. Tað sita kanska 1 mió fólk og bíða eftir júst mær at fiksa hendan trupulleikan*

**Norska vitjan**
Í mai mánaði í fjør vóru fólk frá norsku sjónvarpsrásini "Visjon Norge" (TVVN) í Kelduni og gjørdi upptøkur í samband við møtini hjá amerikanska prædikumanninum Rodney Howard Brown.

Hanus var tá ein teirra, sum hjálpti til við ymiskum uppgávum, men var sjálvur ikki partur av upptøkunum.

- Eg helt hetta verða ógvuliga spennandi, tí eg havi altíð dámað væl alt tað, sum hevur við teknikk og útgerð at gera, sigur ungi maðurin úr Saltangará.

Útgerðin teir brúka hjá Visjon Norge er bæði nógv og nútímansgjørd.

- Eg hevði aldrin sæð so nógva útgerð á einum staði, sum hon í upptøkubussinum hjá Visjon Norge .

- So tú kanst ætla, at tað var eitt ótrúliga stórt upplivilsi hjá mær at sleppa at stýra ljóðinum á tí síðsta kvøldinum teir vóru her, sigur Hanus

Her var talan um eitt ungdómsmøti sum kortini ikki varð sent á rásini.

Seinni fekk Hanus fatur á telduadressuni hjá stjóranum á sjónvarpsrásini, Leif Inge. Hann gjørdi ikki mætari enn at spyrja um møguleikan hjá sær at koma til Noregs at arbeiða hjá teimum. Og svarið hann fekk var játtandi.

Hanus gekk um hetta mundið í 1. flokki á studentaskúlanum á Kambsdali. Hann gjørdi hetta árið liðugt, og fór so til Noregs í juni mánaði í fjør.

Saman við honum fór ein ung kvinna, nevniliga Jonna Joensen, sum hann kendi úr samkomuni í Kelduni.

**Bera yvir við hvørjum øðrum**
Hanus og Jonna vóru ikki meiri enn komin til Noregs, áðrenn tey fóru í sving.

Byrjað varð við einum

**FAKTA**

**TV Visjon Norge**
Fyrsta kristna sjónvarpsstøðin í Skandinavien sum sendir 24 tímar um samdøgrið.
Endamálið er at røkka Noregi og Skandinavien við kristna boðskapinum.
Visjon Norge er ein tvørkirkjulig rás, sum hevur høvuðssætið sítt í norska býnum Drammen. Íalt kunnu fólk í 38 londum síggja sendingar teirra.
18 ára gamli Hanus Jacobsen hevur arbeitt á støðini síðani á sumri 2006. Fráýggjárinum varð hann settur í fast starv.